# SKOTLAND – FRÁLÍKT TIL BÆÐI BØRN OG VAKSIN

Skotland hevur eina ørgrynnu av tilboðum til vaksin og børn. Upplivið vøkur slott, vakrar borgir og nógv djóralív. Njótið sól og strendur, fantastiska náttúru og mentan. Vitjið barnavinarligar karavanparkir og spennandi whiskybryggjarí, valið er tykkara, tit hava bilin við.



## KARAVAN FAMILJUFERIA Í 9 DAGAR

Spennandi pakkaferðir til frálíku karavan-frítíðardeplarnar »Grannie´s Heilan Hame« og »Nairn Lochloy«. Báðir deplarnir hava Treetops Grove Kids Club, har børnini kunnu tekna, dansa, syngja, spæla spøl og luttaka í ymsum kappingum. Tætt við deplarnar er vøkur sandstrond og møguleikar at sigla við kano, royna »Activity Monster Park«, ríða, spæla golf, koyra ein túr til Inverness og mangt annað. Loch Ness er tætt við, og upplagt er at vita, um tit síggja víðagitna ódjórið.

**9 NÆTUR FYRI 2 VAKSIN + 2 BØRN (5-12 ÁR) KR. 10.496,-**

Íroknað kostnaðin: Tórshavn-Scrabster fram og aftur í bláari fráferð 30.06-28.07 í familjukamari uttan vindeyga og við 4 koyggjum og wc/bað + 1 bil (upp til 1,9 m h., 5 m l. og 2 m b.) + uppihald í 1 viku á Grannie's Heilan Hame í karavan »Carron« við 4+2 seingjarplássum. Avgreiðslugjald, á kr. 60,- fyri hvønn, oljugjald á kr. 25,- fyri hvønn og orkugjald, er íroknað prísin.



## KAMPINGPAKKI TIL SKOTLAND

Ferðist til Skotland við egnum kampingvogni og bili. Veljið sjálvi, hvar tit gista. Nógv góð kampingpláss eru í Skotlandi. Byrji t.d. kampingferiuna í Nairn Lochloy ella á Grannie`s Heilan Hame frítíðardeplunum.

***SPARIÐ 5.110,-**

**PRÍSUR FYRI 4 FERÐANDI**
**ÍROKNAÐ BIL OG KAMPINGVOGN KR. 6.110,***

Íroknað kostnaðin: Tórshavn-Scrabster fram og aftur við fráferð 16.06-18.08 í familjukamari við wc/bað + 1 bil og kampingvogn (upp til 12 metrar longd íalt). Avgreiðsugjald, á kr. 60,- fyri hvønn, oljugjald á kr. 25,- fyri hvønn er íroknað prísin. * Tilboðið er einans galdandi fyri limir í Camping.fo



## HIGHLAND & ISLANDS RUNDFERÐ

Rundferð í Northern Highlands og á teimum 3 vøkru og áhugaverdu oyggjunum Isle of Skye, Lewis og Harris. Tit koyra á vøkrum fjallavegum, vitja gamlar Klanborgir og síggja leivdir frá ófriðarligu søgu Skotlands og skotska stríðið við bretsku trónuna. Sí meira kunning um rundferðina á bls. 11.

**9 NÆTUR FYRI HVØNN TÁ IÐ 2 FERÐAST SAMAN KR. 8.250,-**

Íroknað kostnaðin: Tórshavn-Scrabster fram og aftur í bláari/reyðgulari fráferð 16.06 og 18.08 í kamari uttan vindeyga og við 2 undirkoyggjum og wc/bað + 1 bil (upp til 1,9 m h., 5 m l. og 2 m b.) + uppihald í 1 viku á 3*** og 4**** gistingarhúsum í dupultkamari við wc/bað og morgunmati. Avgreiðslugjald á kr. 60,- fyri hvønn og oljugjald á kr. 25,- fyri hvønn, er íroknað prísin.

SMYRIL LINE · J. BRONCKSGØTA 37 · POSTSMOGA 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL +298 34 59 00 · FAX +298 34 59 50 · BOOKING@SMYRIL-LINE.FO